# Í dag kemur vindatlasið sum vísir hvussu vindurin er um allan heim

**Jógvan Hugo Gardar**

21.10.2015 - 12:40

Oljan.fo

Veður og vindur hevur áhuga hjá nógvum av okkum, og nú verður møguligt at fylgja við hvussu vindurin er um allan heim. Í dag verður eitt sokallað vindatlas almannakunngjørt. Hetta er eitt samstarv millum fleiri lond, har Danmarks Tekniske Universtet hevur verið ein av pørtunum.

Ætlanin við hesum atlasinum, ið ein kann leita í á netinum, er at hjálpa millum annað teimum sum leggja til rættis fyri vindorku.

Talan er um tað mest umfatandi og ókeypis tólið hjá teimum sum vilja vita meir um vind kring heimin. Útgevararnir siga at hetta atlasið millum annað kann hjálpa teimum sum skulu byggja vindmyllur til at leggja tær har vindviðurskiftini eru tey bestu.